


# Flaggskip føroyinga á veg heim

**Størsta einstaka verkætlanin í føroyskari handilssøgu nakrantíð, gjørdist veruleiki mánadagin, tá Smyril Line tók yvir nýggju Norrønu**

NÝGGJA NORRØNA

*Eirikur Lindenskov og Jan Müller*

**Travemünde:** Um middagsleiti týsdagin 8. apríl legði nýggja Norrøna frá bryggju í Travemünde við kós móti Havnini. Við skipinum eru umleið 250 ferðafólk, teirra millum eisini innbodnir úr gestir úr Føroyum, Íslandi, Hetlandi, Týsklandi, Danmark og Noregi. Umframt føroysk tíðindafólk eru um hálvthundrað útlendsk tíðindafólk við.

Samstundis sum føroyingar kunnu fegnast um at hava fingið hetta glæsiliga far, so harmast arbeiðsfólkið á Flender Werft, tí við yvirtøkuni av Norrønu, fer skipasmiðjan samstundis í søguna, og øll arbeiðsfólkini missa størv síni. Flender Werft er farið á húsagang, og var byggingin av Norrønu seinasta uppgávan hjá búnum.

Nýggja Norrøna kostar umleið 700 mió krónur. Skipið er fíggjað í Týsklandi, og er tað bankin FKW, sum samskipar fíggingina. Lánið er 520 milliónir krónur, restin er eginfígging. Rentan er 4,5 % og fyrsta árið er avdráttarfrítt.

Skipið var formliga tikið yvir kl 15:56 mándagin á høvuðsskrivstovuni hjá Flender Werft í Lübeck, har nevndarformaður, stjóri, skipasmiðju- og bankaumboð skrivaðu undir skjølini, og har Óli Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipasýninum, eisini góðkendi pappírini.

Norrøna er 36.000 brt, og er hon tríggjar ferðir so stór, sum gamla Norrøna. Hetta er størsta einstaka privata verkætlan í føroyskari søgu nakrantíð..

Norrøna er 164,5 m long, hon er 30 m breið. Deyðvektin er 4.300 tons og ferðin er 21 míl

Høvuðsmotorar hava 30.000 HK, bógskrúvur 6.000 HK. Skipið tekur 1.482 ferðafólk, og manningin telur 118. Skipið tekur 800 bilar ella 130 trailarar.



»Norrøna Buffet« kallast fínara matstovan umborð á nýggju Norrønu. Myndin er frá samkomuni umborð mándagin, beint áðrenn skipið varð handa Smyril Line



Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn og konan, Elsa Mariu Bærentsen. Við liðuni á borgarstjóranum situr Dagmar Joensen, stjóri í Rúsuni og forkvinna í Framtaksgrunninum



*Norrøna við bryggju í Travemünde í Týsklandi, har fyrstu bilarnir komu umborð mánakvøldið. Skipið fór frá bryggju um middagsleitið týsdagin við kós móti Havnini, har skipið væntast hósdagin kl 15*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Flaggskiftið á níggjunda dekki á nýggju Norrønu mánadagin eftir at endaligu skjølini vórðu undirskrivað*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Ólavur Hovsgarð er skipari á nýggju Norrønu fyrsta túrin. Hann verður eisini skipari fyrstu tíðina.*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Sera rúmliga bildekkið á Norrønu, sum kann taka heilt upp í 800 persónbilar. Bildekkið er í tveinum hæddum við eini eykalyft til einar 90 bilar*



*Rampan upp á ovara bildekkið á Norrønu*